Trygdin sparast


— *Vanvirðing av løntakarunum sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag*

Skerjingar landsstýrisins koma nú eisini at raka arbeiðseftirlitið. Stovnurin skal skerjast við umleið 30%. Hetta er so stórur niðurskurður, at leiðarin á stovninum metir ikki, at arbeiðseftirlitið kann virka eftir ætlan í framtíðini. Eli Davidsen hevur sent løgmanni bræv, har hann vísir á, at ætlaða skerjingin heilt leggur stovnin í knús. Jógvan Sundstein hevur í fjølmiðlunum svarað, at Arbeiðseftirlitið hevur fingið ov nógvar deildir og at virksemið hjá stovninum skal niður á tað stoði, tað var fyrr. Eitt úrslit av hesum verður so, at ætlaða deildin í Vestmanna fer ikki at lata upp.


Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, heldur ætlan landsstýrisins vera eina vanvirðing av løntakaranum.

— Undanfarna landsstýrið royndi at útbyggja henda stovnin, men nú roynir so hetta landsstýrið at niðurbróta alt tað, sum varð bygt upp aftur. Tá floksblaðið hjá løgmanni skrivar, at fráboðaðir skaðar eru øktir í sama mun sum játtanin til stovnin, so er tað ein vanvirðing og undirmeting av øllum løntakarum. Tað er greitt, at fólkaflokkurin á henda hátt einans ynskir at hjálpa arbeiðsgevarunum, sum í støran mun ikki leggja stórvegis í trygdina hjá arbeiðsfólkinum. Eg vóni bara ikki, at hinir flokkarnir taka undir við hesum ætlanum hjá løgmanni, sigur Ingeborg Vinther í eini viðmerking.

jan



Hesi seinastu árini hava nógvir skaðar verið á fiskavirkjum okkara orsakað av tørvandi tryggleika. Hetta ger, at stórur tørvur er á einum arbeiðseftirliti, sum kann útinna eitt fyribyrgjandi arbeiði. Í síðsta enda vinnur samfelagið pengar við einum vælvirkandi arbeiðseftirliti, tí skaðarnir kosta nógv bæði fyri tann einstaka og fyri samfelagið, sigur Ingeborg Vinther.



DAGBLAÐIÐ

Fyrstur at vena seg (sum vant) leiðarin á Arbeiðseftirlitinum, tí stovnurin hevur verið fyri einum lítlum niðurskurði í uppskotnu fíggjarjáttanini komandi ár. Restina av Føroya fólki kann bara gleða seg í hesum føri, nú Arbeiðseftirlitið skal klára seg fyri 3,6 mió. kr. Higartil er tað nevnuliga statistiska prógvað, at talið á fráboðaðum arbeiðskaðum er økt í sama mun um játtanin til henda stovn! Logiskt má frægasti máti at sleppa av við arbeiðskaðar vera at avsiga Arbeiðseftirlitið heilt.

avreiðingar

í Norðoyum og Leirvik í farnu viku (viku 35)

Kosavirkið

Bjørgvin sn.	38.500 p
Blåaberg	3.900 p
Brattennið	1.200 p
Brimnes	1.800 p
Dalsennið	1.00 p
Dragasund II	23.500 p
Dúgvan	300 p
Eldorado	14.500 p
Esther sn.	74.500 p
Fjalltangi	1.200 p
Hálgafelli	4.000 p
Havnatindur	8.100 p
Havsbrún	4.700 p
Hvítiklettur	300 p
Jóhanna Maria	2.300 p
Kristina	1.600 p
Lindin	300 p
Másasteinur	1.200 p
Mildrid	400 p
Nakkur	1.400 p
Nancy	1.800 p
Nevið	1.600 p
Nevið Reyða	10.000 p
Norðklett	6.300 p
Olgar í Gerðum	2.200 p
Petur á Hædd	300 p
Polo	2.900 p
Saturn	1.500 p
Skorhamar	5.600 p
Slættafjall	2.000 p
Snæfelli	800 p
Skipaleitið	1.200 p
Sjey systrar	1.500 p
Vársól	1.200 p
Vesturhavið	4.800 p
Vesturlið	4.300 p
Zelotes	2.000 p
Vónbjørt	1.500 p

Roykivirkið

Brøðraberg	2.000 p
Dragin sn.	27.200 p
Glóðanes	20.200 p
Gulennið	500 p
Háennið	8.300 p
Herdis	3.300 p
Norðan	8.000 p
Ritunøvan tr.	15.000 p
Sunneva D	3.700 p

Joensen & Olsen

Jógvan S. isl.	120.000 p

Frostvirkið

Áarskarð	1.100 p
Anna Maria	500 p
Brattanes	3.400 p
Hjørdis Maria	3.200 p
Høgabrúgv	200 p
Høgiklettur	400 p
Jaspissteinur	700 p
Kristnes	900 p
Møðketil	4.000 p
Neshamar	4.000 p
Skuraklettur	2.700 p
Randalshamar	10.600 p
Torratindur	1.600 p
Tunnafjall	9.900 p
Turið	1.000 p
Vátiklettur	1.100 p

»Vesturvón« er her í vikuni við sløkum 800 tonsum av flaki úr Barentshavinum.

»Skálaberg« hevði mánadagin 825 tons og »Sundaberg« 766 tons og »Nónhamar« 428 tons.

»Karina«, ið er við Svalbard, hevði mánadagin 150 tons.

»Borgarin«, sum er á svartkalvaveiðu, hevur umleið 110 tons.

Almannastovan søkir skrivstovufólk

Eitt starv sum avloysari fyri skrivstovufólk á pensjónsdeildini í tiðarskeiðnum 01.10.89 og umleið 24 vikur fram, er leyst at søkja.

Arbeiðið fevnir serstakliga um:

Upprættan av málum, skriving av ávisingum og hertil hoyrandi arbeiði í sambandi við EDV-skipanina.

Umsøkjari við skrivstovuútbúgving ella hollum kunnleika til skrivstovuarbeiði hevur fyrimun.

Lønin er ásett sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið.

Skrivlig umsókn saman við møguligum prógvum, læribrævi, viðmælum v.m. verða at senda Almannastovuni, Postboks 196, 110 Tórshavn innan 25. september 1989.